## Endurlýsing

### Einalærari í Sandvíkar Skúla

Tíðaravmarkað starv sum einalærari fyri lærara í barnsburðarfarloyvi í Sandvíkar skúla verður lýst leyst til setanar frá 15. januar – 30. juni 2007.

Í Sandvíkar skúla eru 5 næmingar í 1. – 4. flokki.

**Um starvið:**
Einalærarin undirvísir í øllum lærugreinum og hevur fyrisitingarligu ábyrgdina av skúlanum.

**Søkt verður eftir einalærara, sum**
- undir árbyrgd skúlamyndugleikanna skal hava fyrisitingarligu og námsfrøðiligu leiðsluna og ábyrgd av dagligu undirvísingini
- skal fremja góðar arbeiðsumstøður og gott samstarv millum skúla og heim
- dugir at samstarva og er fyrikomandi
- skal vera førur fyri at loysa trupulleikar
- skal eggja næmingum og foreldrum at fáa sum mest burtur úr skúlagongdini bæði fakliga og sosialt

**Førleikakrøv:**
Umsøkjari skal hava fólkaskúlalæraraútbúgving. Um eingin lærari søkir starvið, verður fólk, ið ikki hevur fólkaskúlalærarútbúgving, sett í starvið.

**Lønar- og setanartreytir:**
Setanarøkið er undir Mentamálaráðnum við tænastu í Sandvíkar skúla.

Starvið verður lønt sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Lærarafelag í lønarflokkunum 21.2 – 30.2.

Umsókn saman við prógvi, C.V. o.ø. skal verða Mentamálaráðnum í hendi í seinasta lagi 5. januar 2007 kl. 16.00.

Tey, ið ynskja fleiri upplýsingar um starvið, kunnu ringja til Jenny Lydersen, undirvísingarleiðara, ella Olaus Jespersen, deildarstjóra.

**Mentamálaráðið**


Jeep Grand Charokee

Bíligir bilar STUBBIN Ring!



Fjarðarvegur 12, 350 Vestmanna, www.stubbin.fo, tlf: 471 800






Forlagið Hellurnar gevur triðja árið á rað út bók. Hesa ferð eitur bókin *„900 dagar í Singapore“* og fevnir um teir 900 dagarnir, høvundurin **Jústinus Leivsson Eidesgaard** starvaðist í Singapore frá august 1996 og fram til januar 1999.

Hetta tíðarskeið vóru hjúnini Poula og **Jústinus Eidesgaard** savningarstaðurin hjá teimum mongu føroyingunum, sum vitjaðu Singapore, serliga sjómenn, men eisini vanlig ferðandi. Fleiri litmyndir prýða bókina millum annað við skipavitjanum og føroyingum í Singapore.

Bókin er skrivað í tveimum høvuðsløgum og einum triðja, sum av og á kemur til sjóndar. Beinagrindin eru útisetabrøvini, sum høvundurin skrivaði heim til landsmenninar, og sum vóru lisin upp í útvarpinum. Hesi vóru sera væl móttikin heima. Hetta er fyrsta lagið, næsta lagið er søgan um Singapore fram til loysing í 1965. Tað er grundarlagið fyri, at landið, sum er minni enn Føroyar og telur yvir 3 milliónir íbúgvar, er heimsins fjórríkasta land, og hevur lyft seg út triðja heiminum og inn í fyrsta eftir einum ættarliði. Triðja lagið eru eygleiðingarnar, høvundurin gjørdi, nú hann vitjaði aftur í fyrst í hesum árinum.

Bókin vísir eisini føroyingum, at smáar tjóðir kunnu røkka ovastu rók.



Minst til bíleggingarseðilin!

Ovaragøta 1, 188 Hoyvík,
Tel. 322800 ella 223143
justinus@post.olivant.
fo, www.hellurnar.com

**Forlagið Hellurnar**
v/Jústinus Leivsson Eidesgaard


## Matrikulstovan er stongd vegna flyting

Frá hósdegnum 21. desember 2006 til mánadagin 8. januar 2007 er Matrikulstovan stongd.

Telefontíð er frá kl. 10 til 12 hesar dagar:
21.-22. desember og 2.-5. januar.
Telefon 357900
Postadressan er: Boks 327, 110 Tórshavn.

Á heimasíðuni www.matrikul.fo sæst, hvussu samband fæst við stovnin.

Latið verður upp aftur á Traðargøtu 38, Argir, mánadagin 8. januar 2007

MATRIKULSTOVAN

## Vágs Kommuna

Kommunuskrivstovan og Kunningarstovan eru opin soleiðis millum jól og nýggjár.

Mikudag, Hósdag og Fríggjadag kl. 14.00-16.00.

Umsókn um loyvi at brenna nýggjársbál mugu vera kommunuskrivstovuni í hendi í seinasta lagi 28. desember.

**Vágs Kommuna**

Skrivstova felagsins er stongd frá fríggjadegnum 22. desember til og við týsdagin 2. januar 2007.

Somuleiðis ynskir Føroya Arbeiðarafelag limum sínum við familju og øllum viðskiftafólkið, eini Gleðilig Jól og Harrans Signing í komandi ári, við tøkk fyri skjótt farna ár.

**Føroya Arbeiðarafelag**

Lesið Sosialin - so eru tit við